SPEKT | løggildir grannskoðarar

# Sjálvsognarstovnurin Føroya Symfoniorkestur

Ársroknskapur 2023

Staravegur 17, Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34

Stangaskákið 1, Postboks 346
FO-710 Klaksvík
Telefon 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Sp/f 2732

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Leiðslufrágreiðing | 3 |
| Átekning leiðslunnar | 4 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 5 |
| Ársroknskapur 1. januar - 31. desember | 8 |
| Nýttar roknskaparreglur | 8 |
| Rakstrarroknskapur | 10 |
| Fíggjarstøða | 11 |
| Notur | 12 |

# Upplýsingar um felagið

Sjálvsognarstovnurin Føroya Symfoniorkestur
Hoydalsvegur 15
100 Tórshavn

Heimstaður: Tórshavn
Roknskaparár: 1. januar - 31. desember

## Stýrið

Jógvan Thomsen, Almanna- og mentamálaráðið, formaður
Jóhannes Andreasen, Føroya Symfoniorkestur
Anna Klett, Føroya Symfoniorkestur
Jonna F. Mortensen, Kringvarp Føroya
Gunn Hernes, Norðurlandahúsið
Jákup Simonsen, Tórshavnar Kommuna

## Stjórn

Hans Petur í Brekkunum, stjóri

## Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
100 Tórshavn

## Aðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.

# Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Endamálið hjá Sjálvsognarstovninum Føroya Symfoniorkestri er at reka symfoniorkestur á høgum stigi og annað tónleikarligt virksemi, ið er við til at nøra og styrkja tónleikalívið her á landi fjølbroytt og dygdargott.

Alt virksemi varð umskipað til sjálvsognarstovn tann 26. november 2018. Allar ognir og skyldur hjá Føroya Symfoniorkestur vórðu latnar nýggja sjálvsognarstovninum Føroya Symfoniorkestur, so skjótt sum nýggja stýrið og nýggi stjórin eru farin til verka.

**Raksturin**

Úrslitið fyri 2023 gjørdist eitt hall á 92 tkr. samanborið við eitt hall upp á 649 tkr í 2022. Við árslok 2023 var eginognin 194 tkr.

Tiltøk blivu sett í verk fyri at betra um úrslitið í 2023 samanborið við 2022, og hevur tað eydnast nakað, tó er ikki komið heilt á mál. Goldið hevur verið fyri nýggj verk í 2023, eins og at fleiri stórar konsertir vóru, og er tað orsøkin til hallið í 2023.

Tiltøk eru sett í verk fyri at fáa javnvág í roknskapin fyri 2024.

## Átekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2023 fyri Sjálvsognarstovnin Føroya Symfoniorkestur.

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins pr. 31. desember 2023, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar ársaðalfundsins

Tórshavn, hin 19. mars 2024

Stýrið:

Jógvan Thomsen
*formaður*

Jóhannes Andreasen

Anna Klett

Jonna F. Mortensen

Gunn Hernes

Jákup Simonsen

Stjórn:

Hans Petur í Brekkunum
*stjóri*

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til Sjálvsognarstovnin Føroya Symfoniorkestur***

***Grannskoðanarátekning á ársroknskapin***

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Sjálvsognarstovninum Føroya Symfoniorkestur fyri roknskaparárið 1. januar– 31. desember 2023 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttan roknskaparhátt.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í tráð við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum eru í tráð við givna játtan og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum og eisini "Kunngerð nr. 125 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan" og góðum almennum grannskoðanarsiði. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar sambært hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ein ársroknskap uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt stovnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka stovnin, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

### Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðaraátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparabrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera roknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt stovnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðaraátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at stovnurin ikki er førur fyri at halda fram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um, hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið, er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 19. mars 2024

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f



Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023

## Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Føroya Symfoniorkestur fyri 2023 er gjørdur eftir ásetingunum í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.".

Nýttu roknskaparreglurnar eru óbroyttar í mun til undanfarna ár.

## Rakstrarroknskapurin

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur, nýttar til at røkka ársins inntøku, verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

### Inntøkur

Stuðul verður inntøkuførdur í tí ári, hann viðvíkur. Gávur og annar stuðul verður inntøkuført, so hvørt tað verður inngoldið. Inntøka frá atgongumerkjasølu verður inntøkuførd í tí ári, hon viðvíkur.

### Uttanhýsis kostnaður

Uttanhýsis kostnaður fevnir um fundar- og ferðakostnað, skrivstovuhald, ritbúnað og lýsingar v.m.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartrengdir kostnaðir.

### Útreiðslur

Útreiðslurnar verða útreiðsluførdar í tí ári tær viðvíkja.

### Fíggjarligar inntøkur og -útreiðslur

Fíggjarligar inntøkur og –útreiðslur fevna um rentur.

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapi.

### Onnur skuld

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís svarandi til áljóðandi virðið.

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023

## Rakstrarroknskapur

| | Nota | kr. 2023 | kr. 2022 |
|---|---|---|---|
| Lønir vm. | 1 | -3.131.819 | -2.651.127 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2 | -1.595.112 | -1.308.818 |
| Keyp av útbúnaði | 3 | -671.215 | -464.035 |
| Leiga | 4 | -164.267 | -161.093 |
| Inntøkur | 5 | 5.470.448 | 3.936.542 |
| **Ársúrslit** | | -91.965 | -648.531 |

## Uppskot til yvirskotsbýti

| | | | |
|---|---|---|---|
| Flutt úrslit | | -91.965 | -648.531 |

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023

## Fíggjarstøða 31. desember 2023

| OGN | Nota | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---|---|---|
| Depositum | | 0 | 0 |
| **Áogn** | | **0** | **40.000** |
| **Tøkur peningur** | | **270.581** | **360.097** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **270.581** | **360.097** |
| **OGN TIL SAMANS** | | **270.581** | **400.097** |

| SKYLDUR | | |
|---|---|---|
| Fluttur vinningur | 285.716 | 934.247 |
| Flutt frá rakstri | -91.965 | -648.531 |
| **Eginogn til samans** | **193.751** | **285.716** |
| Ognarar | 73.455 | 114.381 |
| Onnur skuld | 3.375 | 0 |
| **Stuttfreistað skuld** | **76.830** | **114.381** |
| **Skuld til samans** | **76.830** | **114.381** |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | **270.581** | **400.097** |

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023

## Notur

| | | kr. 2023 | kr. 2022 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Lønir vm** | | |
| | Lønarútreiðslur | 958.049 | 860.513 |
| | Tónleikarasamsýningar | 2.104.571 | 1.730.552 |
| | Eftirlønir | 18.385 | 18.657 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld | 50.814 | 41.405 |
| | **Starvsfólkakostnaður til samans** | **3.131.819** | **2.651.127** |
| 2 | **Keyp av vørum og tænastum** | | |
| | Skrivstovuhald | 100.935 | 18.003 |
| | Telefon, internet vm | 15.293 | 4.485 |
| | Grannskoðan, roknskaparhjálp og bókhald | 52.750 | 25.625 |
| | Trygging | 12.104 | 19.663 |
| | Keyp av vørum annars | 37.377 | 50.828 |
| | Ferðing, hotel og flutningur | 991.181 | 977.358 |
| | Starvsfólkaútreiðslur | 245.618 | 81.664 |
| | Keyp av tænastuveitingum annars | 139.854 | 131.192 |
| | **Keyp av vørum og tænastum til samans** | **1.595.112** | **1.308.818** |
| 3 | **Keyp av útbúnaði** | | |
| | Tólbúnaður | 0 | 12.733 |
| | Ljóðføri, tilhoyr og nótakeyp | 671.215 | 451.302 |
| | Skrivstovuútgerð | 0 | 0 |
| | **Keyp av útbúnaði til samans** | **671.215** | **464.035** |
| 4 | **Leiga** | | |
| | Hølisleiga | 164.267 | 161.093 |
| | **Leiga til samans** | **164.267** | **161.093** |
| 5 | **Inntøkur** | | |
| | Mentamálaráðið | 2.500.000 | 2.200.000 |
| | Norðurlandahúsið | 300.000 | 300.000 |
| | Tórshavnar Býráð | 490.000 | 490.000 |
| | Atgongumerkjasøla | 1.815.448 | 412.963 |
| | Kringvarp Føroya | 80.000 | 40.000 |
| | Annar stuðul | 285.000 | 493.579 |
| | **Inntøkur til samans** | **5.470.448** | **3.936.542** |